# Seta trygdina í miðdepilin

**Á Fønix gera tey tað lættari at hava eftirlit við trygdarútgerðini umborð á skipum**

**TRYGD**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo




*- Vit eru nú farin undir eina tænastu til okkara skipaflota, har skipini sjálvi sleppa undan at hugsa um alt, sum hevur við bjargingarútgerð og sløkkiútgerð at gera, sigur Alfred Hummeland á Fønix*

Trygd hevur altíð verið eitt lyklaorð á sjónum.

Tað hava tey eisini gjørt sær greitt á Fønix og sostatt hava tey seinastu tíðina ment eina tænastu, har júst trygdin verður sett í hásæti.

Tí eru teir farnir at veita eina tænastu, sum skipaflotin er sera væl nøgdir við.

Higartil hevur hendan tænastan mest fevnt um útgerðina til eldsløkking og roykkaving.

Og tað, sum er kjarnin í hesi tænastuni, er, at tað er Fønix sjálvt, sum hevur eftirlitið við, at trygdarútgerðin verður røkt sum hon skal eftir forskriftunum.

Tað merkir, at skipini sleppa undan at senda útgerðina til verkstøð á landið til eftirlit.

- Ístaðin skipar Fønix fyri, at eftirlitið er undir føstum karmum og at tað fer fram umborð á skipunum sjálvum.

## Víðkað tænasta

Men nú eru Fønix farin at víðka hesa tænastuna til eisini at umfata bjargingarbátarnar.

- Vit umboða bæði RFD og DSB bjargingarbátar, sigur Alfred Hummeland á Fønix.

Í hesum sambandi kann Fønix nú bjóða skipunum eina avtalu, har bæði bjargingarbátur og eftirlit er íroknað.

- Síðan taka vit okkum av at hava eftirlitið við bjargingarbátunum og at skifta teir út, tá ið tað krevst, akkurát, sum vit gera við útgerðina til eldsløkking og roykkaving, sigur Alfred Hummeland. Hann sigur, at fyrimunurin hjá reiðarum og manning er, at teir fáa nógv minni umsiting av trygdarviðurskiftunum umborð.

Tá ið skipini sjálvi hava ábyrgdina av trygdini, er tað rættiliga tíðarkrevjandi tí tað merkir, at skipini skulu sjálvi syrgja fyri, at trygdarútgerðin verður flutt aftur og fram ímillum verkstøð og skip.

Tað merkir eisini, at eftirlit skal bíleggjast og viðhvørt kann avleiðingin av tí vera, at skip koma at liggja longri við bryggju, enn ætlanin var, tí bíðitíð er eftir at sleppa til eftirlit.

Men tað merkir eisini, at viðhvørt kunnu skip koma í ta støðu, at liggja við púra ongari sløkkiútgerð umborð í eitt tíðarbil.

Men við hesi serligu avtaluni við Fønix, er prísurin eisini fastlagdur og sostatt kenna reiðarar og skip útreiðslurnar til hesi endamál í eitt áramál frameftir.

Og tað merkir eisini, at Fønix sjálvt átekur sær alla ábyrgd av at leggja alt, sum sum viðvíkur eftirlitið og útskifting, í eina fasta legu og at alt fer fram umborð á skipunum, so at tað slepst undan at flyta útgerðina av skipinum, sigur Alfred Hummeland.

KBI
HAR ØLL FÁA EINA GÓÐA TÆNASTU

Vit eru við á
North Atlantic Fish Fair 2007

Vónandi verður høvið hjá tygum, at koma á vitjan hjá okkum til eitt hugnaligt prát.

Vit sýna fram og tosa um vørur frá Castrol marine lube oil, SKF, Norgren, Nilfisk Alto, Kraftwerk, Unitor, Kabi og ymiskt annað.

...vit síggjast í Høll F bás nr. 628 !

Castrol
Nilfisk ALTO Why Compromise
SKF
KRAFTWERK
Barwil Unitor Ships Service
NORGREN

Klingrugarður 2 • Postboks 354 • FO 710 Klaksvík • Tlf. 470 200 • fax 470 201 • www.kbi.fo

creð 458006
Sosialurin